# Noyddir at vinna

*Vágamenn meta seg ikki kunna dúva uppá, at HB tekur sær av at senda sumbingar niður í aðru deild*



*Kanska er talan um seinasta dystin í fremstu røð hjá Jan Joensen, tá KÍ í morgin fer á vøllin í Sørvági*

Jákup Mørk

Hóast FS Vágar kann koma at standa seg í deildini, um talan skuldi verið um tap í dag, so er hetta als ikki nakað, sum tey har vesturi ganga og hugsa um.

- Hjá okkum er tað av avgerandi týdningi at vinna. At HB møguliga vinnur á Sumba har suðuri kunnu vit als ikki taka okkum av. Orðini eigur Albert Ari Thomassen, liðformaður hjá FS Vágum.

Vágamenn komu sær fyri tveimum vikum síðani upp um niðurflytingarstrikuna, og har ætla teir sær at verða verandi.

Av fólki eru so at siga allir teir, sum hava verið við seinnu kappingarhálvu, tøkir. Undantakið er tó framvegis evnaríki Tór-Ingar Akselsen, sum enn ikki er komin seg eftir liðbandsskaða í fótinu.

Sostatt eru fortreytirnar undan dystinum so góðar sum tilber, og stendur tað liðformannin fara allir leikararnir at gera alt, teir eru mentir, til tess at tryggjað felagnum eina framhaldandi tilveru í fremstu deildini.

**Kanska seinastu ferð**

Stóri spurningurin undan dystinum tykist vera, hvussu uppsettir klaksvíkingarnir eru til dystin. Heiðursmerkjum kunnu teir neyvan náa hetta árið.

Einki er to at ivast í, at klaksvíkingar vilja enda árið á sømiligan hátt. Kanska er hetta einamest galdandi hjá liðskiparanum, Jan Joensen, sum møguliga spælir sín seinasta fyrstudeildardyst í dag. Ein lítil forðing tók seg upp, tá hann fekk ein snudd i andlitið undir venjingini hóskvøldið, men roknað verður tó við, at hann er tøkur í morgin.

Einasti maður, sum ikki er tøkur hjá Tomislav Sivic til dystin, er Rógvi Jacobsen, Hann er í hesum døgum í Noreg, har hann venur við hálvavegna føroyska liðnum í Sogndal. Í hansara stað verður væntandi Hjalgrím Elttør.

Stóri spurningurin hjá klaksvíkingum er tó, sum nevnt, um viljin til ein sigur er til staðar. Einki er at ivast í, at vágamenn fara at kýta seg alt tað, teir eru mentir, og gera klaksvíkingar ikki tað sama, lúrir vandin fyri einum tapi.



*Vit eiga so avgjørt at vera nøgdir um úrslitini hjá HB í ár. Óansæð um talan verður um gull ella silvur, heldur Birgir Enghamar*

*Mynd: Álvur Haraldnsen*

# Hugsað fyrst um Sumba

*Birgir Enghamar leggur dent á, fremsta fortreytin hjá HB er at vinna dystin suðuri á Krossinum*

Jákup Mørk

Ein av trúføstu HB-stuðlunum ígjøgnum mong ár, er Birgir Enghamar. Havnarfólk flest munnu kenna hann frá taxa-koyringini, har hann hevur tikið mangan túrin, men eisini millum teirra, sum ferðast í Gundadali, er andlitið væl kent.

**Trúgvi upp á tað**

Birgir er HB'ari um ein háls, og umframt at hava verið aktivur á vøllinum, og síðani íðin áskoðari, er hann nú eisini virkin í felagnum, har hann í dag er næstformaður.

Tá tosið fellur inn á FM møguleikan hjá eldra høvuðsstaðarfelagnum, sigur Birgir avgjørdur, at hann framvegis trýr upp á møguleikan.

- Sjálvandi var eg ótrúliga skuffaður, tá B36 javnaði sunnudagin, men eg trúgvi so avgjørt upp á møguleikan, at teir eisini fáa gjørt okkurt við VB, heldur Birgir fyri.

- Alt hatta tosið um, at B36 kanska ikki leggur so nógv í dystin og soleiðis, kann eg ikki trúgva hevur nakað upp á seg. Ítróttur, og kanska serliga grannauppgerðir, eru soleiðis, at hvørki annað ella annað skal geva nakað sum helst frá sær, og soleiðis er tað sjálvandi eisini millum B36 og HB. Hetta er tó eisini galdandi, tá B36 spælir móti VB, tí teir fara so undir ongum umstøðum inn á vøllin fyri at tapa. Harafturat haldi eg, at sum B36 hevur spælt í seinastuni, so liggur trýstið so avgjørt á vágbingum, tí teir standa framman fyri einari sera truplari uppgávu.

- Tá alt hetta er sagt, so skal tó leggjast afturat, at alt hetta kann vera líkamikið, um okkara menn ikki leggja alt í dystin á Krossinum. Ein sigur har er fyrsta fortreytin, áðrenn vit fara at hugsa um, hvussu úrslitið í Gundadali verður.

Um hann verður við á suðuroyarferðini sjálvur, hevur Birgir enn ikki tikið støðu til. Hann greiðir frá, at vanligi avloysara hansara er upptikin hetta vikuskiftið, men um tað eydnast at fáa onkran at koyra, so er hann til dystin fús leygarmorgunin.

- Tað er tó púra vist, at likamikið, hvussu leygardagurin spælir av, so verið eg á keiini leygarkvøldið, tá spælararnir koma aftur til Havnar, tí hava teir so avgjørt uppiborið.

**Nøgdur hóast alt**

Um árið sum heild heldur Birgir, at líkamikið, hvussu úrslitini fara at laga seg leygardagin, so er hann nøgdur um avrikið hjá HB hetta kappingarárið.

- Tað eri eg heilt avgjørt. Sjálvandi vil man altíð vera við í toppinum, tá kappast verður, men undan hesum árinum høvdu vit eingi krøv sett fram í so máta.

- Ungu leikararnir, sum vit hava nýtt í ár, hava tó allir sum ein verið ómetaliga raskir, so eg haldi ikki, at nakar kann loyva sær at vera vónsvikin, um tað ikki verður til gull í ár. Silvurmerkini eru longu tryggjaði, og tað hevði eingin roknað við fyri fimm mánaðum síðani, sigur Birgir at enda.

# Leikhátturin komandi kappingarár

Kappingin í flogbólti byrjar av aftur vikuskiftið 14. oktober, men longu vikuskiftið 7/8 oktober verður stór flogbólskapping í Havn, tann sonevnda FK-kappingin.

Broyttar reglur

Í samband við kappingarárið hevur nevndin í Flogbóltssamabndinum samtykt, at leikhátturin í ár verður broyttur soleiðis, at leikt verður best av 5 settum, soleiðis at skilja, at tann sum fyrst hevur vunnið 3 sett hevur vunnið dystin. 4 tey fyrstu settini eru upp í 25, meðan 5 og seinasta settið er upp í 15. Eins og áður skulu 2 stig vera á muni í settinum áðrenn vinnarin er funnin. Tvs. at settið kann enda 30-28 og ikki 26-25 o.s.v.

Farið verður sostatt burtur frá leikháttinum við tveimum hálvleikum, sum leikt varð eftir seinasta ár, m.a. tí hini Norðanlondini eisini hava broytt leikhátt. Hetta tí FIVB á fundi í Sevillia í august í ár, sum vit eisini luttóku á, greitt segði, at ongar broytingar av týdningi verða gjørdar næstu 3 árini.

Til ber at síggja leikskipanina á heimasíðuni, eins og har stendur at lesa um flogbóltsdystirnar úr OL.



# Avsmurdir í Hollandi

*U–16 dreingirnir løgdu hóskvøldið rygg til 7–0 tap ímóti sera væl leikandi vertstjóðini úr Hollandi*

Í fyrradagin hildu vit fyri, at tann tíðin var farin, tá føroysk unglingalandslið vórðu smurd av í altjóða kappingum. Úrslitið í uppgerðini í Hollandi hóskvøldið kundi bent á, at vit tóku munnin ov fullan.

Føroyingar spældu ímóti Hollandi, og tað er synd at siga, at vertirnir vóru serliga blíðir. Holland vann 7–0, eftir at støðan í steðginum hevði verið 2–0.

– Tað er ikki so nógv at siga til tapið. Okkurt av málunum, sum teir fingu, var eitt sindur bíligt, men teir høvdu fleiri aðrar upplagdar møguleikar, sum teir áttu at havt skorað uppá.

Hetta sigur Jógvan Martin Olsen, sum er ferðaleiðari í Hollandi. Heimaliðið setti hol á í 7. minutti, teir øktu í 21. minutti, og fyrstu løtuna eftir stegðin gekk skjótt. Teir skoraðu í 43. og 44. minutti, og so var føroyingunum púra greitt, at dysturin var so rudduliga taptur. Holland skoraði eisini í 55., 70. og 80. minutti.

Tað var høgt flog yvir hollendska liðnum. Teir vóru allir fínir bóltspælarar, teir vóru skjótir, teir vístu góða spælfatan, teir nýttu breiddina á vøllinum, teir skiftu ímillum langar bóltar, eitt tvey samanspæl og yvirlapp, teir høvdu hegni og sjálvsálit at bjóða av mann móti manni, og teir vístu allar aðrar dygdir, sum kunnu roknast við av góðum spælarum og einum góðum liði.

Føroyska liðið hevði stórar trupulleikar av verjupartinum. Føroyingarnir høvdu bóltin ikki so lítið. Teir royndu at spæla í staðin fyri at sparka, men tað var torført at spæla seg til møguleikar. Einasti møguleikin var beint frammanundan, at Holland økti til 2–0. Einki spurdist burturúr, og í næsta skjóta álopinum fekk Holland mál.



*Millum leikararnar á føroyska U-16 liðnum, sum útlendingar hava bitið merki í, er Jann Ingi Jacobsen. Saman við Inga Højsted skal hann nú venja við PSV Eindhoven*

**Vekja áhuga**

Hóast føroyska liðið hesa ferð stóð seg illa, so fylgja fótbóltsumboðsmenninir, sum hyggja at dystunum í Hollandi, væl við føroysku spælarunum. Liðformaðurin Jann Ingi Petersen skal til PSV Eindhoven í Hollandi um fjúrtan dagar, og eisini er greitt, at Ingi Højsted eisini skal royndarvenja í PSV. Ferðalagið kemur aftur til Føroya sunnudagin. Tá verður Ingi Højsted ikki við, tí hann skal venja í PSV.

– Ein umboðsmaður fyri eingilska stórfelagið Arsenal er her. Hann var eisini í Føroyum fyrr í summar, tá vit høvdu NM kapping. Hann hevur nógvar royndir at finna fram til nýggjar spælarar, og vit hava fleiri ferðir tosað við hann um føroysku spælararnar, sigur Jógvan Martin Olsen.

Jákup í Stórustovu er í Hollandi í hesum døgum. Tað er umvegis hann, at Ingi Højsted fer til PSV. Vit skilja á lagnum, at møguleiki er fyri, at onkrir aðrir spælarar seinni fara av landinum at royndarvenja.

**Rani ikki við**

Í fyrsta dystinum, sum var ímóti Hvítarusslandi, spældi miðverjin Rani D. Christiansen úr HB bara í sjey minuttir. Ein stoytur, sum hann fekk í knæið, var so dyggur, at Rani var noyddur at gevast. Nú er greitt, at løsturin er so meinur, at tað ikki ber til hjá Rana at spæla aftur á túrinum í Hollandi.

Ímóti Hollandi sá liðið soleiðis út: Sámal Jóhan Samuelsen, EB/Streymur – Rókur F. Jespersen, HB, Áki Petersen, ÍF, Marni Djurhuus, EB/Streymur, Eli Thorsteinsson, HB – Hanus Eliasen, ÍF (Magnus Skoralíð, LÍF, 47.), Jann Ingi Petersen, liðformaður, B68, Ingi Højsted, B36, Rasmus Nolsøe, TB (Andy Olsen, NSÍ, 65.) – Mortan Johannesen, B36 (Hans Pauli Samuelsen, EB/Streymur, 72.), Bjarni Jørgensen, HB

Á beinkinum uttan at verða skiftir inn vóru Annfinn í Bartalsstovu, GÍ, Bjarki Danielsen, NSÍ, Aksel Petersen, B68 og Rani D. Christiansen, HB (skaddur).

Føroyska liðið fer í morgin at dystast ímóti Íslandi. Íslendingar taptu hósdagin 3–2 ímóti Hvítarusslandi. Íslendska liðið verður sagt at spæla á sama hátt, sum íslendsk feløg og landsliðið gera. Tað vil siga, at teir hava nógv fólk aftarlaga á vøllinum og dúva oftast upp á langar bóltar. Mótstøðan í morgin verður mett at vera ivaleysa stór hjá føroysku unglingunum.

JH

# Hondbólturin í gongd

*Fyrsta umfar í hondbóltslandskappingini fer av barkastokki um vikuskiftið*

Jákup Mørk

Av kappingarskipanini, sum nýliga er komin út, framgongur, at kappingin er løgd eitt sindur øðrvísi til rættis í ár, enn hon hevur veirð undanfarin kappingarár.

**Goyma tað besta**

Kappingin er nevnliga løgd soleiðis, at tey lið, sum stóðu seg best í fjør, spæla sínar innanhýsis dystir móti endanum av árinum. Allar helst í eini vón, at spennignurin í kappingini skal halda sær sum longst, og at sterku liðini eru so væl fyri, sum til ber, tá avgerandi dystirnir verða leiktir. Ikki tí, kappingarárið í fjør varð eisini sera spennandi, og varð tá einki avgjørt fyrr enn í seinasta dystinum.

Hetta hevur tó við sær, at vit á pappírinum hava nakrar »bleytar« dystir fyrstu umførini. Bleytir er kanska í so nógv sagt, tí einki er at ivast í, at tey á pappírinum veikaru liðini so avgjørt kunnu gera onkran vørr, og tað kanska serliga í byrjanini av kappingarárinum.

Skráin hjá kvinnunum sær ananrs soleiðis út, at Sóljan og Stjørnan spæla í Klaksvík, Kyndil og Tjaldur í Havn meðan VB og VÍF av røttum skulu dystast í Vági. Hesin dysturin er tó útsettur, tí í Vági verður ikki roknað við, at nakað fólk verður eftir í bygdini, ella skuldi man kanska sagt at eingin er uppkomin um trýtíðina, um so er, at FM-veitsla verður á Eiðinum í kvøld.

Hjá monnunum Dystast Kyndil og Tjaldur í Havn, StÍF og H71 á Skála, meðan lokaluppgerð verður í Vestmanna, har KÍF eigur heimavøll móti VÍF.

Sostatt er hjá báðum kynum líkt til, at talan er um greiðar favorittar í øllum dystum, men kortini verður spennani at síggja, hvussu liðini eru fyri.

Fleiri av liðunum hava styrkt um leikarahópin í mun til í fjør, og millum annað verður spennandi at síggja, hvussu útlendingarnir hjá KÍF fara at roynast móti vestmenningum, sum mon meta sum fremsta FM-kandidatin hetta kappingarárið.



*Herfølge er nú komið fram til annað umfar í UEFA-Cup kappingini*

# Jákup og teir hóraðu undan

*Men avrikið hjá Herfølge í UEFA Cup ímóti svenska AIK var ikki serliga sannførandi*

Herfølge var uppií, tá UEFA í gjár skipaði fyri lutakasti um, hvussu liðini skulu hittast í øðrum umfari í UEFA Cup. Atgongumerkið til annað umfarið tryggjaði Herfølge sær, tá teir á heimavølli hóskvøldið megnaðu 1–1 ímóti AIK Solna úr Stokholm. Fyri fjúrtan døgum síðani vann Herfølge 1–0 á Råsunda.

Men hóast fyrimunin av sigri á útivølli í fyrra dystinum, og hóast mótstøðumenninir eftir 35 minuttir fingu ein mann útvístan, so var tað ikki meiri, enn at tað eydnaðist hjá Herfølge samantalt at vinna á AIK.

Svenska liðið kom á odda seks minuttir eftir steðgin. Teir fingu brotsspark, tí ein av teirra monnum varð feldur, tá hann royndi at bróta ígjøgnum í høgru. Jákup Mikkelsen í Herfølge málinum tveitti seg til høgru fyri seg sjálvan. Bólturin kom sama vegin, men tíverri fyri Herfølge og Jákup Mikklsen, so fór bólturin akkurát undir málverjanum og í netið.

Síðstu løtuna var tað óneyðuga spennandi. Herfølge hevði bóltin meiri. Teir megnaðu ikki at samanspæla serliga sannførandi. Um AIK hevði skorað eina ferð afturat, so hevði verið neyðugt hjá Herfølge at skora tvær ferðir. Tí kendist tað strevið, hvørja ferð svenska liðið nærkaðist málinum hjá Jákupi Mikkelsen.

**Venjarin høvuðsleikari**

Eftir vanliga leiktíð var samantalda úrslitið 1–1. Tí var neyðugt við longdari leiktíð. Og tá var tað, at venjarin hjá Herfølge, John Faxe Jensen, gjørdist høvuðsleikari.

Faxe hevði sett seg sjálvan á miðvøllin fyri at fáa meiri altjóða royndir og tyngd í. Venjarin gekk undan í at stríðast, og tá seks minuttir vóru farnir av longdu leiktíðini, skoraði hann málið, sum bar víðari luttøku í UEFA Cup við sær. Faxe rakti bóltin klokkureint. Tað sóu 2688 áskoðarar.

Brøndby og AB spældu eisini hóskvøldið. Brøndby megnaði 0–0 á útivølli í Slovenia ímóti Osijek. Fyri tveimum vikum síðani vann slovenska liðið 2–1 í Brøndby.

Hjá AB helt málturkurin fram. Í 1. hálvleiki ímóti Slavia Prag á Gladsaxe stadion hevði AB fleiri stórar málmøguleikar, men teir komu ikki nærri enn at raka tvørtræ og stólpa. Í fyrsta minuttinum eftir steðgin og í evstu løtu skoraðu mótstøðumenninir. Harvið vunnu teir samantalt 5–0.

Umframt Herfølge fer Viborg at umboða danskan fótbólt í 2. umfari í UEFA Cup. Týskvøldið vunnu teir á heimavøllinum í Viborg 1–0 á CSKA Moskva. Fyrri dysturin endaði málleysur, og tískil var tepri heimasigurin nóg mikið hjá Viborg.

Beint áðrenn evstamark frættist, at Herfølge komandi umfarið skal spæla móti grikska AEK Athen.

JH